 

www.oljan.fo

**Jan Müller** 16 - 06 - 2012

# Løgmaður - Kinverjar stóran áhuga fyri oljuleiting

Kinesarar vísa Føroyum og her ikki minst leitingini eftir kolvetnum á landgrunninum stóran áhuga og ans. Hetta staðfesti Kaj Leo Johannessen, løgmaður eftir prát við kinverjar, sum vóru við til døgurða í donsku kongshjúnunum fríggjakvøldið. Við útvarpið sigur løgmaður, at hann hevði høvi at hitta konu kinesiska forsetan, sum vísti Føroyum, føroyskari søgu og mentan stóran áhuga. Eisini hevði løgmaður høvi at hitta framstandandi umboð fyri kinesisku stjórnina og vinnulívið, og hesi høvdu stóran áhuga fyri Føroyum eitt nú tí stóra tilfanginum í havinum og møguligum ráevnum í undirgrundini. Løgmaður sigur við útvarpið, at hann greiddi teimum frá spennandi leitingini við Føroyar, og at júst hesar dagarnar ger ein kinverskur boripallur klárt til at bora ein týðandi brunn. Í løtuni er ein sendinevnd úr Kina í Føroyum, har hon er at tosa við føroysk vinnulívsfólk og umboð fyri myndugleikarnar. Her verður serligur dentur lagdur á føroysku alivinnuna. Johan Dahl segði við oljan.fo nú um dagarnar, at hann fer eisini at umrøða onnur vinnumál við kinverjar, eitt nú kunna teir um leitingina eftir kolvetnum á landgrunninum.